# VARPIÐ

Tv3 • Sunnudag 12. kl. 20.00

## »Fun with Dick and Jane«

Húsið stendur til at fara á tvingsilssølu, eingir pengar koma á inn á konturnar, og tað stendur nógv á hjá Dick (Jim Carrey). Kona Dick hevur frammanundan sagt starv sítt frá sær. Men tað er als ikki við í teirra fíggjarætlan, at Dick eisini skuldi missa sína inntøku, bert nakrar fáa dagar eftir, at konan er vorðin heimagangandi. Amr. skemtifilmur við Jim Carrey og sjálvum Alec Baldwin!



TV TELEVARPIÐ

Sosialurin

KRINGVARP

SvF • Leygardag 11. kl. 13.45

## »Føroyar-Eysturríki í Landskrona 12.09.90«

SvF endursendir søguliga landsdystin millum Føroyar og Eysturríki í Landskrona á sinni. Hetta í sambandi við, at vit aftur skulu á vøllin móti Eysturríki. Spennandi verður, hvussu leikur fer á hesum sinni.



SvF • Sunnudag 12. kl. 20.00

## »Fimm dagar fyri valdið« - 2:2

Kringvarp Føroya hevur gjørt ein eygleiðandi dokumentarfilm um gongdina í valstríðnum upp undir løgtingsvalið í januar 2008. Tvey upptøkulið fylgdu samgonguleiðaranum Jóannesi Eidesgaard og andstøðuleiðaranum Høgna Hoydal teir seinastu fimm dagarnar í valstríðnum.

**Fríggjadagur 10. oktober 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**